TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

Skúlin og Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt

Tórshavn, 24. august 2017

**Viðv. standinum á skúlabygninginum við Løgmannabreyt**

Í summar hevur verið alment frammi um standin á skúlabygninginum við Løgmannabreyt. Tórshavnar kommuna skal við hesum kunna um viðurskiftini í skúlabygninginum.

Skúlabygningurin, ið hýsir skúla, frítíðarskúla, umframt ítrótta- og frítíðarvirksemi, varð tikin í nýtslu í stigum frá 2008-10 og er uml. 6.200 m2.

Í sambandi við sýn fyrr í ár staðfesti Húsaumsitingin í teknisku fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu, at ávísir uttandura bygningslutir ikki tóktust vera í eins góðum standi, sum væntast kundi, og varð tí málið m.a. tikið upp við høvuðsarbeiðstakaran, ið bygdi bygningin.

Í tí sambandi vóru gjørdar innleiðandi kanningar, ið kundu staðfesta, at fleiri í fleiri støðum vóru vindpláturnar í útvegginum vátar innanfyri klæðingina. Í summum førum er talan um klæðing móti betongi og í øðrum føri móti timbri. Í verandi støðu ber ikki til at siga, hvussu umfatandi skaðin er. Staðfestu skaðarnir eru á vindpláturnar, ið eru uttanfyri sonevndu dampsperruna, og eigur hetta tí ikki at ávirka inniluft og klima í bygninginum.

Húsaumsitingin er farin í holt við at fáa nærri metingar um, hvat skal til fyri at steðga hesum og gera ábøtur.

Eingin soppakanning er gjørd, ið endaliga staðfestir, um talan er um sopp og í hvønn mun. Hesin spurningur verður viðgjørdur í næstum.

Harumframt er ætlanin at gjøgnumganga bygningin av nýggjum við atliti til møguligar lekar í vindeygum v.m. Eisini er ætlanin at fáa framt eina eyka eftirkanning av ventilatiónsskipanini og vegleiðing til starvsfólki í hesum sambandi.

Húsaumsitingin hjá Tórshavnar Kommunu, ið m.a. varðar av skúlabygninginum á Løgmannabreyt, fylgir málinum víðari saman við Mentamáladeildini, ið varðar av skúla og ítróttavirkseminum og Barna- og ungdómsdeildini, ið varðar av frítíðarskúlavirkseminum.

Kunnað verður aftur, tá nærri upplýsingar fyriliggja!

Eru spurningar ber til at venda sær til leiðslurnar á staðnum, og í øðrum lagi:

Unn Sørinardóttir Perdomo, leiðara á Húsaumsitingini, unnp@torshavn.fo
og Sigurð Ó. Vang, mentamálaleiðara, sigurd@torshavn.fo